# Aðalfundur

**Ársaðalfundur Starvsmannafelagsins verður leygardagin 28. februar 2004 kl. 13.00 á Platform í Havnar Klubba.**

**Skrá:**
1) Frásøgn formansins frá
   a) farna ári og
   b) virki felagsins framyvir.
2) Framløga av grannskoðaðum roknskapum til góðkenningar
3) Lógarbroytingar
4) Møgulig uppskot frá limum og nevnd
5) Ásetan av limagjøldum
6) Val av formanni
7) Val av nevndarlimum og tveimum tiltakslimum
8) Val av roknskapargrannskoðara og tiltakslimi
9) Ymiskt.

Limir, sum vilja hava uppskot til umrøðu á aðalfundinum og møgulig lógaruppskot, mugu senda nevndini hesi í seinasta lagi **leygardagin 21. februar 2004.**

Uppskot til formann felagsins er:
**Gunnleivur Dalsgarð**
**Varðabú 32**
**100 Tórshavn**

**Starvsmannafelagið**

# Aðalfundur

**Ársaðalfundur í Eftirlønargrunni Starvsmannafelagsins verður beint eftir aðalfund Starvsmannafelagsins í Havnar Klubba 28. februar 2004.**

**Skrá:**
1) Frásøgn um virki grunnsins í farna roknskaparári
2) Framløga av grannskoðaðum ársroknskapi til góðkenningar
3) Viðtøkubroytingar
4) Val av nevndarlimum
5) Ymiskt

Limir sum vilja hava uppskot til umrøðu á aðalfundinum og møgulig lógaruppskot, mugu senda nevndini hesi í seinasta lagi **leygardagin 21. februar 2004.**

**Nevndin**

# Daewoo Matiz

Fyri P/f Trygd selja vit ein Daewoo Matiz se árg. 02 við skaða, hevur koyrt 14.000 km.

Bilurin kann síggjast hjá P/F Esmar Simonsen á Kambsdali.

**Tlf. 444405 ella 218821**

DAEWOO
- ein skilagóð avgerð!

**P/f Esmar Simonsen**
Tel. 44 44 05 · Fax 44 46 29

# Bilar til sølu

**SsangYong Rexton RX290 4WD 7 setur**



prísur **330.000,-**

· Árgang 2003 · km 22.500 · Aut. gear · 2,9 Turbo diesel intercooler · Automatiska í- og úrkoblan av 4WD · Centrallás · Fjarstýrdan lykil · Tónaðar rútar · Krók · Lættmetalfelgur við dekkum · Pioneer anlegg við fløguspælara · Vælhildin

**Mitsubishi L400**



prísur **120.000,-**

Árgang 1997 · Km 89.911 · 2,5 Turbo diesel · Centrallás · Krók · Sóltak · Anlegg við fløguspælara · Hita í setrum · Elektriskan motorhitara · Vælhildin

Sosialurin 341800

**BILVERKSTAÐIÐ**
v/ H.J.Kollsker · á Hjalla · Tlf 31 10 13
Tlf 21 10 13 · Boks 3262 · FO-110 Tórshavn
www.kollsker.com

# Kunngerð

## um innangarðsútskiftingarfund fyri Norðskála bygd

Eftir lóg nr. 147 frá 27. mars 1939, sum seinast er broytt við løgtingslóg nr. 110 frá 29. juni 1995, § 9, verður boðað til útskiftingarfund mikudagin 26. mai 2004 kl. 11.00 í húsinum hjá Kommunufelagsskapinum í Sundalagnum á Oyrarbakka.

Til viðgerðar verður innangarðsútskifting av Norðskála bygd.

Nevdarlimirnir eru Marita í Brekkunum, Hósvík og Jákup Skoradal, Miðvágur.

Tórshavn, tann 6. februar 2004

N. v.
Øssur Á. Midjord,
útskiftingarnevndarformaður

# Høli til leigu

Skrivstovuhølir í Niels Finsensgøtu 37 til leigu.

**Tlf. 31 14 10**

**VINNUMÁLARÁÐIÐ**

# Fulltrúi

Av tí at ein av okkara løgfrøðingum er farin í annað starv, verður søkt eftir løgfrøðingi í Vinnumálaráðið.

**Høvuðsuppgávur:**
Høvuðsuppgávurnar hjá fulltrúanum eru:
- At ráðgeva landsstýrismanninum og stjóranum
- Gera uppskot til lógir og kunngerðir
- Málsviðgerð
- Kæruviðgerð

**Førleikakrøv:**
Tú hevur:
- Útbúgving sum cand. jur.
- Kunnleika til EDV, og
- dugir væl føroyskt og enskt

**Setanartreytir:**
Starvið verður sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og løgfrøðingafelagið. Setanin umfatar Vinnumálaráðið og stovnar undir tí, umframt onnur aðalstýri.

Umsókn við prógvum o.ø. skal vera send til:

**Vinnumálaráðið**
Postrúm 377
110 Tórshavn

**Freist:**
Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 20. februar 2004. Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til Arna Poulsen, tlf. 356070.

**Mentamálaráðið**
*Vinnu- og Miðnámsskúladeildin*

# Sjálvlesandi

**Innskriving til próvtøku í ymsum miðnámsútbúgvingum**

Sjálvlesandi, her í millum umgangarar, ið á sumri 2004 ætla sær til FHS-, HH-, HT- ella HIF-próvtøku, skulu í seinasta lagi 25. feburar 2004 innskriva seg til próvtøku við tann skúlan, har tey ætla sær til próvtøku. Innskrivingarblað at fylla út fæst frá skúlanum.

**10. februar 2004**
**Mentamálaráðið**

# Ársaðalfundur

Ársaðalfundur Skála Handverkarafelags verður fríggjadagin 27. februar 2004.

Tíð og stað verður lýst seinni.

Skrá sambært lógum felagsins.

Allir limir eiga at møta.

**Nevndin**



# Vælkomin til møti í Samljóð



Stórmøtir verða
í Samljóð í Skopun
við prædikumanninum
Viggo Vilhelmsen
úr Noregi



Jens og Kristel Lisberg
luttaka við sangi

Møtini verða:

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjadagin | 13. februar | kl. 20.00 |
| Leygardagin | 14. februar | kl. 20.00 |
| Sunnudagin | 15. februar | kl. 11.00 og 19.00 |

Øll eru hjartaliga vælkomin.
Eisini verður drekkamunnur aftaná kvøldmøtini

Sosialurin 341800

***Hagstova Føroya***

*er sjálvstøðugi hagtalsstovnur landsins.*

*Stovnurin er í trimum deildum - Hagdeild, KTdeild og Útgávudeild, sum samstarva um at veita almenninginum góð og skjót hagtøl um so nógv viðurskifti sum til ber.*

*Á stovninum arbeiða 15 fólk - búskaparfrøðingar, samfelagsfrøðingar, KT tøkningar og skrivstovufólk.*

## *Starv á Hagstovuni*

*Hagstovan hevur tørv á fólki til fólkahagtøl, serliga íbúgvahagtøl, arbeiðsmarknaðarhagtøl og inntøkuhagtøl.*

*Til at hava hesa uppgávu um hendi, sóknast vit eftir einum væl útbúnum fólk. Verkætlanirnar í hesum sambandi fara fram í tøttum samstarvi við KT tøkningar og tí vera eisini krøv sett um góð samstarvsevni og góð samskiftisevni um dataskipanir.*

*Besti førleikin er akademisk samfelagsfrøðilig útbúgving, men hevur tú aðra hægri útbúgving og haraftrat royndir ella serligan áhuga í samfelagsmálum, kann hetta vera nøktandi førleiki til starvið. Royndir av arbeiði við telduforritum og datagrunnum geva fyrimun.*

*Starvið verður lønt eftir galdandi sáttmála millum Landsstýrið og avvarandi fakfelag.*
*Umsóknirnar skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 1.mars 2004.*

*Set teg í samband við Axel Nolsøe, deildarleiðara, ella Hermann Oskarsson, stjóra, á Hagstovu Føroya, telefon 352800, vilt tú hava meira at vita um starvið.*



# VÁGAFÓLK!!

## KOMIÐ OG SYNG VIÐ!!

**Leygarkvøldið 14. februar 2004 klokkan 21.00, skipar yngra kvartettin í Betesda Klaksvík fyri evangeliskari sangløtu í**

## CAFETERIANUM Á FLOGVØLLINUM

| | |
|---|---|
| **Á skránni er:** | **Felagssangur** |
| | **Kvartettsangur** |
| | **Filmbrot** |
| | **Leikur** |
| | **Tala** |

**Aftaná verður boðið til kaffi, og onkrum afturvið**

**ØLL eru hjartaliga vælkomin**
**MINST TIL! KL. 21.00**

*Smakkið, og síggið, at HARRIN er góður! Sælur er tann maður, ið søkir sær skjól hjá Honum.*

***Sálmur 34,9***

**TIL SØLU**

**Seat Leon mai 2002 til sølu um hóskandi boð fast. 17" felgur og 16" við vetrardekkum. Koyrt 27.000 km 180 HK Ring 533053 ella 333435 eftir arbeiðstíð**



